# íðardagur



*Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, sum skipar fyri Vinnudegnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ársins virkir higartil:

| | |
|---|---|
| 2000 | Havsbrún |
| 2001 | Tórshavnar Skipasmiðja |
| 2002 | Vónin |
| 2003 | Vaðhorn |
| 2004 | Reyni Service |
| 2005 | Faroe Marine Products |
| 2006 | Thor |
| 2007 | Eik Banki |
| 2008 | ArtiCon |

## Ársins átøk higartil:

| | |
|---|---|
| 2000 | Ikki valt |
| 2001 | North Atlantic Fish Fair |
| 2002 | Teitur Lassen |
| 2003 | Total View, Formula.fo |
| 2004 | Atlantic Airways, sáttmálin við Aker Stord |
| 2005 | Fariga Seafood |
| 2006 | Vinnuvitan |
| 2007 | Ikki valt |
| 2008 | Decision3 |

ikki nakað um, hvørt eitt virki kann veljast fleiri til hendan heiður, men Martia Rasmussen heldur, at tað skuldi einki verið í vegin fyri tí, um nøækur ár ganga ímillum.

- Men tað skal sjálvandi ikki verða so, at eitt virki kann veljast ár undan ári. Tað hevði tikið broddin av degnum. Hinvegin er tað einki, ið forðar fyri, at ein fyritøka kann veljast til ársins virki meiri enn einaferð, sigur Marita Rasmussen.

Vinnudagurin byrjar í morgin klokkan gott eitt í Norðurlandahúsinum, og endar á Hotel Føroyum við døgurða og dansi.

# Førir ábyrgd við sær

**ARTICON**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er Niclas Joensen, fíggjarstjóri í Articon, sum vegna vinnuna er við í dómsnevndini, sum velur ársins virki.

Tað er ógvuliga positivt fyri økkum øll, ikki bara leiðslu, men fyri øll starvsfólkini, at fáa eitt slíkt herðaklapp, sigur Niclas Joensen um heiðurin, ið fall Articon í lut, tá teir í fjør vórðu valdir til ársins virki.

Vinnandi virkið fær ein lim í dómsnevndina árið eftir, og sostatt verður Articon gjøgnum Niclas Joensen við til at kjósa ársins virki í ár.

Tað kom rættiliga óvart á, at vit vórðu valdir til ársins virki í fjør. Hinvegin forpliktar tað eisini. Vit kenna tað sum eina ábyrgd at liva upp álitið, ið var víst okkum, ikki minst út frá teimum kriterium, sum verða sett fyri kjósan av ársins virki, sigur Niclas Joensen.



*Articon fekk heiðurin av at verða kosið ársins virki í fjør. Jón Danielsen og Niclas Joensen tóku móti sjónliga prógvinum*

Hann heldur, at Vinnudagurin er eitt sera gott tiltak hjá Vinnuhúsinum.

Mær dámar dagin væl, og eg havi verið við síðani tað byrjaði. Dagurin er eitt gott høvi at hitta fólk í vinnuni undir avslappandi umstøðum, har tú kanst tosa um leyst og fast, sigur Niclas Joensen.

Burtursæð frá Leiðsludegnum, sum Synergi skipar fyri, er Vinnudagurin einasta høvi hjá vinnuni at hittast. Og tað eru ikki bara avslappandi umstøðurnar, sum draga vinnufólk til dagin.

Fyrilestrarnir plaga at vera ógvuliga áhugaverdir og viðkomandi. Tað er óført, at tað eru føroyiskir fyrilestrahaldarar við, tí vanliga eru vit føroyingar ikki góðir at selja okkum sjálvi. At tað so eisini eru útlendskir kapasitetir eisini, sum halda fyrilestrar, er í fínasta lagi, sigur Niclas Joensen.